# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Føðingar

10. mai fingu Maud og Hanus Poulsen, Hvalba, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 4050 gr.

19. mai fingu Anna Sofía og Mikael Larsson, Hong Kong, ein son. Hann var 48 cm. langur og vigaði 2915 gr.

19. mai fingu Kristina Griksaite og John Arni Svabo Samuelsen, Sandavágur, ein son. Hann var 53 cm. langur og vigaði 3700 gr.

19. mai fingu Tóra Joensen og Bergur Højgaard, Skála, eina dóttur. Hon var 53 cm. long og vigaði 3900 gr.

20. mai fingu Palma Jacobsen, Kambsdalur og Sólarn Solmunde, Syðrugøta, eina dóttur. Hon var 54 cm. long og vigaði 4000 gr.

21. mai fingu Elin og Sonni Samuelsen, Hósvík, ein son. Hann var 52 cm. langur og vigaði 2900 gr.

21. mai fingu Bjørg Hofgaard Nielsen og Áki Siggertsson Nielsen, Vestmanna, eina dóttur. Hon var 53 cm. long og vigaði 3300 gr.

22. mai fingu Annika í Dímun og Freddie Poulsen, Tórshavn, ein son. Hann var 57 cm. langur og vigaði 4000 gr.

22. mai fingu Sólvá Jacobsen og Jóannes Jakobsen, Hoyvík, ein son. Hann var 55 cm. langur og vigaði 3940 gr.

22. mai fingu Lis og Jóhan Sørensen, Skála, ein son. Hann var 44 cm. langur og vigaði 2090 gr.

**Konfirmatión**

27. mai konfirmerast Sævar Þór Skoradal, sonur Baldrún Hodnn Savarsdóttir og Thor Johan Skoradal, Sandavágur. Adr. Brekkuvel, 620 Dalvík, Ísland.





27. mai konfirmerast í Íslandi Sandra Vilborg Zachariassen dóttir Bjarmey Bjarmarsdóttir og Jens Erik Zachariassen, Sørvágur. Adr.: Brekkusel, 620 Dalvík, Ísland.

**90 ár**

Mánadagin 28. mai verður Olivur Holm í Hvalba 90 ár. Dagurin verður hildin hjá Jens Olivar og Jonnu í Skálum frá kl. 15.30. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Brúdleyp**

Leygardagin 26. mai kl. 16.00 giftast í Vesturkirkjuni Hildur Nielsen og Hans Laksá. Veitslan verður hildin á Hotel Føroyum kl. 19.00.

Leygardagin 26. mai giftast í Eggeslev magle kirke Susanne Corell, Slagelse og Bárður Anthoniussen úr Kollafirði. Adr.: Tjørnevej 2, DK 4230 Skælskør.

Sunnudagin 27. maj klokkan 11.30 giftast í Vor Frue Kirke, Svendborg, Bárður Sandá, Vágur og Christina Brust, Svendborg. Veitslan verður fyri innboðin á Hotel Svendborg, Svendborg.

2. hvítusunnudag, 28. mai kl. 16, giftast Sunneva Jakobsen, Tórshavn og Mark Craig, Liverpool í Vesturkirkjuni. Veitslan verður fyri innbodnum seinni um kvøldið í hølunum hjá Starvsmannafelagnum, J. H. Schrøtersgøta 9, Tórshavn.

Vestmanna Sløkki- og Bjargingarlið:

# Skjóttgangandi gummibjargingarbát til bjargingararbeiði

**Mikudagin 16. mai var móttøka á brandstøðini í Vestmanna í sambandi við at Vestmanna Sløkki- og Bjargingarlið hevur fingið ein skjóttgangandi og væl útgjørdan gummibjargingarbát**




*Kári Hansen frá P/F Stubbanum handar Fríðálvi Bláhamar, brunaumsjónarmanni og leiðara av Vestmanna Sløkki- og Bjarginarliði, lyklarnar til bátin*

MÓTTØKA
*Myndir: Jens Kristian Vang*

Til móttøkuna á brandstøðini í Vestmanna vórðu tey boðin, sum á ymiskan hátt hava stuðlað Vestmanna Sløkki- og Bjargingarliði, við at fáa til vega ein skjóttgangandi og væl útgjørdan gummibjargingarbát til uppgávur á sjónum. Tilsamans 18 einstaklingar, stovnar og feløg hava stuðlað verkætlanini við bjargingarbátinum.

Fríðálvur Bláhamar, brunaumsjónarmaður og leiðari av Vestmanna Sløkki- og Bjarginarliði, beyð øllum at vera vælkomin og takkaði stuðlunum fyri áhugaðan.

Aðrir sum hildu røður undir móttøkuni vórðu: Øssur Christiansen, formaður í brunanevndini, Karl Olsen, borgarstjóri í Vestmanna, og Kári Hansen frá P/F Stubbanum sum hevur selt og uppbygt bátin.

Báturin, ein Valiant Vanguar, ið er góðkendur til 15 fólk, men kann taka 20-25 fólk umborð um ikki siglt verður – um t.d. bíðað verður eftir hjálp á einum vanlukkustaði. Motorurin er ein 115 hk Mercury.



*P/f Stubbin í Vestmanna hevur eisini staðið fyri uppbyggingini av bátinum*

Eingin ivi er um, at bygdini tørvar ein slíkan bát, sigur Fríðálvur Bláhamar, sløkkiliðsleiðari í Vestmanna. Tá hugsað verður um fjølbroytta virksemið á sjónum og við sjógvin, har ofta nógv fólk samlast, er eingin ivi um, at bygdini tørvar ein slíkan bát. Nevnast kunnu eitt nú útróðurin, alsamt vaksandi ferðavinnan við bátum her úr bygdini og stevnurnar – Fjarðastevnan og bátastevnan, har rættuliga nógv fólk savnast á og við sjógvin.

Báturin kann sigla við yvir 40 míla ferð. Fftir 10 minuttum kann hann vera á nærmastu útróðrarleiðunum. Eisini kann hann brúkast til at leggja forðingar út í samband við oljudálking á sjónum, sigur Fríðálvur Bláhamar.

Her kann nevnast, at Vestmannahavnar Havn eigur neyðugu forðingarnar. Sløkkiliðið hevur útvegað pumpu, sum skjótt kann siglast á vanlukkustað á sjónum, har hon bæði kann brúkast til at sløkkja og lensa við.

P/f Stubbin í Vestmanna hevur eisini staðið fyri allari uppbyggingini av bátinum og nautisku útgerðini, eins og búnum til manningina.

Avdúkað varð á móttøkuni, at báturin hevur fingið navnið "Løjtnanturin" og skrásetingarnummar VN 112. "Løjtnanturin" var navnið á eini gamlari skonnart, sum hoyrdi til Vestmanna.

Báturin hevur longu verið í drift, nevniliga á bátastevnuni 19. mai, tá neyðugt varð at sleipa ein bát, sum hevði fingið motorbrek.



*Móttøka fyri stuðlunum var á brandstøðini í Vestmanna*